Eitt ljós á gøtu míni

v/ Johs. A. Næs

»Men tá ið nú kongurin fór innar at siggja gestirnar, bar hann eyga við ein mann, sum ikki var klæddur í brúdleypsklæði.« (Matt. 22, 11).

Í hesum líknilsi sigur Jesus okkum, at Guð vil halda eina æviga hátíð, og at hann bjóðar øllum menniskjum á jørðini, men at tey flestu leggja ikki í innbjóðingina. Men hitt mest álvarsama í øllum líknilsinum stendur í orðunum omanfyri.

Millum tey fáu, sum tóku við bjóðingini, var ein, sum varð kastaður út. Hann var ikki í brúdleypsklæðum. Fyri okkum ljóðar hetta bæði hart og illa hóskandi. Men fyri ein eysturlending var hetta skilligt. Við hátíðir hjá stórmonnum var tann siður, at allir gestirnir fingu hátíðarklæði, tá ið tey komu til hátíðina. Og tað var at vanvirða hann, ið boðað hevði, ikki at fara í brúdleypsklæðini til hátíðina. — Tað var hetta, hesin eini gjørdi. Hann vanvirdi gávu og vælvilja hansara, ið boðið hevði. Og tí gekk tað honum so illa, sum tað gjørdi.

Í dag vil Jesus vara okkum.

Vilt tú lurta eftir Jesusar ávaring ídag?

Vilt tú vita sannleikan um teg sjálvan, um tú ert av sonnum kristin ella bert kristin av navni? Tann neyðars maðurin, vit hoyra um, tagdi. Tú vildi kanska mótmælt og sagt: »Eg eri jú umvendur. Minnast tygum ikki, at tey bóðu mær á hinum eftirmøtinum? Og síðan tá havi eg verið ein kristin. Og øll have álit á mær. Eg eri við í sangkórinum, eg biði á biðimøtum, og vitni.«

Men hvat sigur tú so, um kongurin svarar: »Eg veit alt hatta. Men eg kenni teg ikki. Náði mína nýtir tú til at umbera syndir tínar við. Eg fái ikki longur loyvi til at tala við teg um tín sterka syndahug. Tú bert navn av at liva, men tú ert tó deyður!«



Gudstænastur 6. sunnudag eftir trinitatis

Havnar kirkja: Ejvind Vilhelm
Vestukirkjan: Kjartan Mørkøre
Argir: Høgni Poulsen, altargongd
Kirkjubøur: Høgni Poulsen
Kvívík: Jákup Magnussen
Funningur: Emil Olsen kl. 12,00, altargongd
Glyvrar: Jákup Kass kl. 11,00
Sjóvar kirkja: Peter Petersen kl. 11,00, altargongd
Leirvík: Torkil Beder, altargongd
Klaksvík: Tummas Jacobsen
Kirkja: Henrik Fossing kl. 12,00
Sandavágur: Martin R. Jacobsen kl. 11,00
Sandur: Jákup R. Hansen kl. 12,00

Ólavsøkugudstænastan

Ólavsøkugudstænastan verður mánadagin 30. juli kl. 11,00 í Havnar kirkju.

Henrik Fossing, sóknarprestur á Viðareiði, prædikar.

Evangeliska Røddin

Føroyska sendingin frá Trans World Radio, Monte Carlo hoyrist hvørt mánakvøld kl. 21,45 GMT (Før. tíð kl. 22,45), á millumbylgju 205 m (1466 kHz).

Mánakvøldið 30/7 talar Rodmund Nielsen úr Havn. Evni: Minst Jesus Kristus, sum er risin upp frá hinum deyðu. Sangur: Betesdakórið.

Læknavaktir

Tórshavn: Kristianna Nordendal, tlf. 1 2979, leygard. og mánad ., Sølvi W. Olsen, tlf. 1 6611, sunnud.
Læknavaktin: 1 6200
Eysturoy: Sigvald Kristiansen, tlf. 41 5l7, leygard. og sunnud.
Norðuroyggjar: Ólavur Gaard, tlf. 5 6900
Vágar: Tlf. 32 413
Suðuroy (norður): Tlf. 71 560
Suðuroy (suður): Tlf. 73 030

Tannlæknavaktin, Tórshavn

Bráfeingishjálp í dag og morgin kl. 13.00 — 14.00. Tlf. 1 4544.

sosialurin
telf. 11820



17. juli fingu Bjarta og Osvald Joensen, Tórshavn eina dóttur.

19. juli fingu Anna og Magnus Skýlindal, Kollafjørður, ein son.

20. juli fingu Súsanna og Bogi Vinther, Tórshavn, ein son.

20. juli fingu Súsanna og Amaliel Jensen, Sand, ein son.

20. juli fingu Poula og Kristian á Dul, Argir, ein son.

21. juli fingu Bodil og John Kirke, Saltnes, ein son.

22. juli fingu Mary og Jónhard Berg, Strendur, ein son.

22. juli fingu Súsanna á Sondum Estbú og Bjarki Henriksen, Sand, eina dóttur.

22. juli fingu Kristina og Anfinn Olsen, Søldarfjørður, eina dóttur.

24. juli fingu Simona og Hans Elias Joensen, Fuglafjørður, eina dóttur.

24. juli fingu Margun Madsen og Jan Knoph, Kvívík, ein son.

25. juli fingu Kitty og Holger Hansen, Kollafjørður, ein son.

Ósømiligt búmerki fyri Føroyar

Í íslendska Altýðublaðnum stóð grein um Norðurlandahúsið og viðurskiftini innan mentanina í Føroyum.

Í greinini verður sett spurnartekin við, um alt Føroya fólk nú er so fegið um mentunarstovnin og tað virksemi, sum fer fram har.

Átrúnaðarbólkar sigast hava komið sær upp í leikin beinanvegin, tá Norðurlandahúsið í fjør heyst varð tikið í nýtslu. Hesum dámdi ikki pappírsklippið hjá Williami Heinesen, sum myndar nakin fólk og verur, sum beinleiðis eru sprottin úr hugfloginum hjá skaldinum. Tey vilja vera við, at plakatin er ósømilig og eitt vánaligt búmerki fyri Føroyar. Blaðið upplýsir, at herverk er framt móti listaverkinum, sum hongur í dansihølinum í Norðurlandahúsinum.

Sosialurin hevur spurt Steen Cold, leiðara á Norðurlandahúsinum, um nakað veruligt er í hesum?

— Viðvíkjandi listaverkinum í dansihølinum her, so er einki hent við tí. Tað hongur so væl fyri og er so umfevnandi, at tað illa ber til at gera seg inn á tað.

— Tað er rætt, at fólk hava verið ymisk á máli, tá tað snýr seg um innihaldið í plakatini, og fleiri fólk hava tosað við meg um hetta. Í seinastuni hevur tó verið friðarligt um málið.

Er einki herverk framt?


— Nei, fyri sovítt ikki. Bert eru plakatirnar oyðilagdar, sum hava hingið á ymsum stovnum og á støðum, har fólk hittast. Eingin ivi er um, at tað er gjørt við vilja, tí hon hevur verið pettað sundur. Tað hendir tó einki við tí. Vit seta nýggjar upp ístaðin.


— Ein ávís misnøgd var í byrjanini, tá stovnurin varð latin upp, tí plakatin eftir Williami Heinesen varð hongd í dansihølið. Fleiri fólk komu til mín og gjørdu vart við, at hon var ósømilig, men annars er einki hent.

Vóru hesi fólk innan átrúnaðarbólkar?

— Tað veit eg ikki. Eg var júst komin til Føroya og kendi ikki fólkini, sigur Steen Cold at enda.

Dag.


Tit ringja
sosialurin,
tlf. 11820
— vit skriva



Brúdleyp

Í dag giftast í Porkeris kirkju Marjun Mortensen og Sigmundur Egil Olsen, bæði úr Porkeri.

Prógv.

Bergur í Garði á Strondum hevur við universitetið í Keypmannahavn tikið hagfrøðiprógv (cand.polit.).